## Oyggjablaðið

**Oyggjaredaktiónin:**


Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo


Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo


Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo

# Eitt hesta arbeiði

**VERKHÚSIÐ** - Her er sera gott at vera, tí starvsfólkini eru sera dugnalig, sigur Herman Joensen, ið er ein av brúkarunum á Verkhúsinum í Sørvági

Snorri Brend

Tað sær kanska ikki út av nógvum. Men aftanfyri eina og hvørja pútu liggur eitt stórt arbeiði.

Tað kann Herman Joensen skriva undir uppá. Hann býr á sambýli í Sandavági, men er regluliga til arbeiðis her á verkhúsinum í Sørvági.

Í løtuni er hann farin undir fyrsta stigið til eina mynd, sum hann í roynd og veru fór undir á jólum. Myndin av báðum hestunum verður einaferð seinni fest á eina pútu.

- Hetta er eitt drúgt arbeiði, tí ein má vera sera nærlagdur, skilir tú. Nú havi eg ikki nógv eftir - nøkur fá røð, so tað fer kanska at taka ein mánað ella so aftrat.

- Ja, hetta tekur sína tíð, greiðir Herman frá.

Hann hevur verið sera íðin í arbeiði sínum, og er haraftrat vorðin stuðlaður og væl hjálptur av dugnaligu starvsfólkunum á verkhúsinum.

Úr hansara hondum eru higartil komin bæði turrikløð, dýnubetrekk til børn, løparar, lappar og mangt annað, sum viðskiftafólkini í handlinum hjá verkhúsinum hava havt møguleika at ogna sær gjøgnum nógv ár.

- Mær dámar sera væl her, sigur Herman Joensen.

*snorri@sosialurin.fo*

**» Nú havi eg ikki nógv eftir - nøkur fá røð, so tað fer kanska at taka ein mánað ella so aftrat**



**NÆRLAGNI**

*Herman Joensen er sera íðin og nærlagdur í sínum arbeiði. - Hetta teppið havi eg eisini vovið, greiðir hann frá.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



**HESTAR**

*Herman Joensen er ein av brúkarunum á verkhúsinum í Sørvági. Her er hann í ferð við at arbeiða uppá eina mynd av tveimum hestum, sum einaferð í framtíðini fara at prýða eina pútu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*